# Brynhild og Astrid í uppskoti til Barnabókavirðisløn Útnorðurráðsins

**Barnabókin Kuffi, sum Brynhild Andreasen hevur skrivað og Astrid Mac Donald hevur gjørt tekningarnar til, er í uppskoti til fyrstu Barnabókavirðisløn Útnorðurráðsins**

BARNABÓKA-VIRÐISLØN
*Turið Kjølbro*




*Brynhild Andreasen og Astrid Mac Donald, høvundur og teknari, og móður og dóttir, eru í uppskoti til Barnabókavirðisløn Útnorðurráðsins 2002. Her avmyndaðar uttanfyri Pæsastovu saman við synunum hjá Astrid, Albert og Alexander*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað kann ikki sigast annað enn at vera ein góð byrjan hjá Brynhild Andreasen. Fyrsta og einasta bókin, hon hevur skrivað, barnabókin Kuffi, sum kom út í fjør, er í uppskoti til Barnabókavirðisløn Útnorðurráðsins í ár og verður í hesum sambandi týdd til íslendskt, grønlendskt og annað norðurlendskt mál.

Og Brynhild er sum vera man fegin.

– Hetta hevði eg als ikki væntað, sigur Brynhild, sum til dagligt arbeiðir sum lærari á Sernámsdeplinum.

Hugskotið til bókina hevði hon í nógv ár, áðrenn hon setti seg at skriva.

– Tað kom eitt kvøldið, vit grillaðu fisk og fóru at tosa um fiskanøvn. Tá komu nøvnini kuffertfiskur, havtaska og annað á borðið, og beinanvegin sá eg eina søgu fyri mær. Hóast hon ikki bleiv skrivað beinanvegin, fór hon ikki frá mær, og tá hon var skrivað, lá hon leingi, áðrenn eg sendi hana víðari til Bókadeildina.

Spurd um hon hevur onnur hugskot, sigur hon, at okkurt er.

-– Havi onkur hugskot. Tankarnir eru kanska vaksnir, men hugskotini eru til børn. Tað er stuttligt at skriva til børn, og ikki minni stuttligt at lesa fyri børnum. At fyrsta bókin hevur fingið so góða móttøku, gevur mær áræði til meir, sigur Brynhild.

Føroyska málið er ein trupulleiki, heldur hon kortini.

– Tað fellur mær ikki lætt at skriva orð, sum eg ikki kundi funnið uppá at sagt sjálv, men tað eri eg noydd til í bókini. Málið er frá byrjan broytt nógv, tí bókin er farin ígjøgnum nógvar hendur, sigur hon, og leggur afturat.

– Eg veit ikki, hvat er meiri føroyskt, enn tað sum føroyingar tosa í dag.

### Fleiri at velja ímillum

Føroyska ummælisnevndin við Helenu Dam á Neystabø, Oddfríði Rasmussen og Oddvør Johansen hevði umleið fimtan barna- og ungdómsbøkur, sum eru skrivaðar síðstu trý árini, at velja ímillum. Og sambært Helenu Dam á Neystabø var ikki lætt at velja.

– Nógvar góðar barna- og ungdómsbøkur eru komnar út í Føroyum seinastu trý árini. Vit valdu bókina um Kuffa, tí hon er nýskapandi bæði í innihaldi og tema, sigur hon.

Í grundgevingini verður sagt, at bókin er væl uppsett, og tekningarnar, sum eru góðar og einfaldar, hóska væl til tekstin. Kuffi byggir á eitt ævintýrakent og stuttligt hugskot um kuffertfiskarnar Kuffa og Uffa og um havtaskurnar Havdís og Havlisu. Hesir løgnu fiskar eru tó ikki so veruleikafjarir kortini. Og á sín hátt sigur bókin eisini frá vistfrøðini í havinum, um vandan hjá summum fiskasløgum at vera avoydd, og um náttúrunnar undrunarverdu mátar at endurskapa javnvágina. Eisini onnur evni sum eru gerandis í millum annað Føroyum og í útnorði, fáa týdning fyri gongdina í søguni, tí havið er sjálvt umhvørvið í bókini.

Eisini meiri álvarslig evni sum til dømis rasuskilnaður, veruligt vinarlag, kærleiki og burturhugur hava týdning fyri søguna um Kuffa. Hóast fiskar, so hava høvuðsfiskarnir bæði lív og lyndi. Teir eru stuttligir og fáa í heilum lesaran at smílast við og flenna. Teir eru viðkomandi fyri børn, og vit verða góð við teir.

Kuffi er ævintýr, har hetjurnar skulu prógva fyri sær sjálvum og umheiminum, at tær við hegni, vísdómi og styrki megna at vinna á stórum forðingum og trupulleikum. Megna tey uppgávuna, so bjarga tey bæði sær sjálvum og sínari ætt. Hesin frásøguháttur skapar spenning og fremur lesihugin, sigur ummælisnevndin.

### Týddar

Í hesi vikuni verður eisini greitt, hvørjar bøkur verða í uppskoti til virðislønina úr Íslandi og Grønlandi. Um góðan mánað ella so verður avgerð tikin um, hvør bókin fær heiðurin, og virðislønin verður handað á ársfundinum hjá Útnorðurráðnum í august í ár. Virðislønin er 60.000 kr.

Tað var á ársfundi í Útnorðurráðnum fyri tveimum árum síðani í Íslandi, at avgerð varð tikin um at seta á stovn eina Barnabókavirðisløn. Endamálið við stovnanini er at stuðla bókmentirnar í Útnorði og at stimbra teir høvundar, sum evna til børn. Eisini er ynskið hjá ráðnum at gera vart við, at Útnorður er eitt øki, sum hoyrir saman. Ein virðisløn sum hendan er við at gera hesa felagsskaparkensluna sjónligari.

Bøkurnar, sum eru í uppskoti til virðislønina, verða týddar til hini málini, og tí er møguligt hjá eitt nú íslendskum og grønlendskum børnum at lesa um føroyska Kuffa á havsins botni. Eisini hetta er eitt endamál hjá Útnorðurráðnum.

# Semja um KT-vørðarnar

**Mikudagin skrivaðu Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið undir avtalu um KT-vørðarnar**

KT-ØKIÐ
*Turið Kjølbro*

Tað skuldu ikki nógvir samráðingarfundir til at fáa semju um KT-økið í fólkaskúlanum uppá pláss. Mikudagin skrivaðu Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið undir semju um niðurskurð hjá KT-vørðum, og hóast úrslitið liggur nakað frá tí, sum Føroya Lærarafelag hevur lagt upp til og sum eitt álit hevur mælt til, er forkvinnan í Føroya Lærarafelag nøgd við, at ein avtala loksins er komin undir land.

– Vit eru nøgd við at hava fingið nakað afturat til KT-vørðarnar, at teir fáa skipað viðurskifti og eina neyva starvslýsing, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í felagnum.

Í pengum fáa teir umleið 20 KT-vørðarnir á leið 700.000 krónur í alt. Tilmælið, sum er gjørt sambært semjuni frá apríl 2000, legði upp til slakan helming afturat.

– Føroya Lærarafelag hevur arbeitt saman við nevndini í KT-varðafelagnum og sum skilst eru teir nøgdir við, at semjan hóast alt er ein bati, um enn ikki so góður, sum vit høvdu vónað. Seinni ber til at samráðast til meir.

KT-vørðarnir eiga til uppgávu námsfrøðiligu røktina av teldunum, men ta meiri teknisku síðuna eiga kommunurnar nú sum áður. Tað vil siga, at skal eitthvørt tekniskt gerast í teldunum, skulu fólk uttanifrá boðsendast til ta uppgávuna og kommunan gjalda.

Fyrst í hesum mánaðinum hótti Føroya Lærarafelag við, at ongin undirvísing verður í kunningartøkni á skúlunum kring landið komandi skúlaár. Orsøkin var, at so striltið hevur gingið at fáa í rætt lag KT-økið. Hendan hóttanin skuldi eftir at øllum at døma loysa seg, tí bert tvær vikur seinni varð semja undirskrivað, og yvirlýsingin er sostatt tikin aftur.

Eftir er at gera eina neyva starvslýsing til KT-vørðarnar. Hana gera Mentamálastýrið og Føroya Lærarafelag í felag, og sum skilst verður tað beinanvegin.

Enn ein knútur er so loystur. Í farnu viku var tað savnsrøktin, sum semja varð fingin um.

– Vit eru við at hála okkum uppá ta støði, sum Føroya Lærarafelag longu tá ið fólkaskúlalógin varð sett í verk fyri 4-5 árum síðani, segði varð neyðugt, um arbeiðast skuldi eftir lógini, sigur Elsa Birgitta P. Petersen.



# Olja og fiskivinna á stevnu í apríl

**Stóra fiskivinnustevnan North Atlantic Fish Fair verður í Runavík í døgunum 29. apríl til 1. mai næsta ár. Samstundis er eisini ætlanin at hava oljumessu í Runavík. Roynt verður at fáa Joachim prins og Alexandru prinsessu at luttaka á stevnunum**

FISKIVINNUSTEVNA
*Edvard Joensen*




*Áki í Skemmuni greiðir útlendskum vitjandi frá fiskivinnustevnuni, sum verður um mánaðarskiftið apríl mái komandi ár*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Runavík:** Onnur útgáva av fiskivinnustevnuni North Atlantic Fish Fair verður í Runavík um mánaðarskiftið apríl-mai komandi ár. Ætlanin er eisini at skipa fyri eini oljustevnu í Runavík um somu tíð. Roynt verður at fáa Joachim, prins, og Alexandru, prinsessu, at luttaka. Eisini verður roynt at fáa ymsar fremmandar fiskimálaráðharrar at koma hendanveg til stevnunarnar.

Hesum greiddi ein av fyrireikarunum, Áki í Skemmuni, frá á samkomu fyri eini sendinevnd av býráðspolitikarum og vinnulívsfólki úr Hirtshals, sum hildin varð í býráðshøllini í Runavík mikudagin.

Aftur komandi ár verður Norrøna liggjandi sum hotelskip í Runavík, meðan stevnan verður hildin. Men hesaferð fer tað at verða tann nýggja Norrøna, sigur Áki í Skemmuni.

Eitt annað tiltak, sum skipað verður fyri í Runavík um somu tíð, sum fiskivinnistevnan verður hildin, verður ein oljuráðstevna, sum nevnd verður North Atlantic Oil Fair.

Av tí, at Runavík er oljuútgerðarhavn okkara, varð hildið, at tað var eitt gott hugskot eisini at hava oljuvinnuna umboðaða á eini stevnu í Runavík.

Stevnurnar verða tó skildar at soleiðis meira ella minni.

Í fjør var fiskivinnuráðstevnan hildin bæði á havnarlagnum og á ítróttarøkinum og á floti.

Komandi ár verður hon bara á havnarlagnum og flótandi, meðan ítróttarøkið verður sett av til oljustevnuna, sigur Áki í Skemmuni.

Fiskivinnustevnan verður komandi ár í trimum tjøldum á havnarlagnum, eins og tvær hallir eisini fara at hýsa stevnuni.

Í fjør varð stevnan hildin í tveimum tjøldum og einari høll á havnarlagnum, umframt at aliparturin var í ítróttarhøllini.

Men komandi ár verður so ein heil framsýning fyri seg í ítróttarhøllini, nevniliga oljustevnan.

Stevnan fer at líkjast teirri seinastu rættiliga nógv, siga fyrireikararnir, og nakað væl av tilmeldingum eru longu komnar.

Í fjør varð undirtøkan góð, sigur Áki í Skemmuni. 212 framsýnarar vóru við, og býtið var soleiðis helvt um helvt føroyingar og útlendingar.

Knapt 7.200 vitjandi vóru á stevnuni. Tey vóru ættað úr 19 ymiskum londum, og av teimum vóru gott hálvtsættahundrað útlendingar.

# 27 ára gamal og 16 fólk á lønarlista

**Hallur Poulsen spennir seg út í Gøtu. Hann hevur nú eisini keypt matvøruhandilin, Dagkeyp, í Syðrugøtu.**
**- Eg eri sera fegin um stóru undirtøkuna frá gøtufólki, sigur Hallur, sum eisini eigur nýggju og stóru kioskina í Norðragøtu**

HANDILSLÍV
*Vilmund Jacobsen*



*Hallur Poulsen hevur nú eisini keypt matvøruhandilin, Dagkeyp, í Syðrugøtu. Dagkeyp er gamli handilin, Valhøll, sum seldi alt millum himmal og jørð*

27 ára gamal og 16 fólk á lønarlista.

Hetta kann ungi handilsmaðurin í Gøtu, Hallur Poulsen, reypa sær av - um hann vil. Men tað ger hann ikki. Hallur er lítillátin, men hevur seinastu tíðina rættiliga spent seg út innan handilslívið, bæði í Norðragøtu og Syðrugøtu.

Hallur keypti kioskina í Norðragøtu, 1. februar 1999, og 1. oktober seinasta ár læt hann upp í nýggjum og snotuligum hølum á sama staði, har gamla kioskin stóð. Hann tók gamla bygningin niður og bygdi nýggjan og nógv størri bygning uppaftur.

Í dag er kioskin í Norðragøtu nógv meira enn bara ein kiosk við grillbar. Hallur selir eisini vanligar matvørur, og fólk eru trúgv at keypa frá honum.

- Vit kunnu siga, at hetta er ein kiosk, grill og matvøruhandil. Opið er allar dagar í viku, eisini leygardag og sunnudag, frá 9 á morgni til 23 á kvøldi, sigur ungi handilsmaðurin.

Hann sigur, at sølan í Norðragøtu er nógv økt, síðan nýggi handilin læt upp, og hann er sera takksamur fyri tann dygga stuðul, sum gøtufólk veita honum.

- Tað er vónleyst at kappast við teir stóru matvøruhandlarnar í prísi, men vit gera okkara besta fyri at hava eitt gott úrval og veita fólki eina góða tænastu, sigur hann.

### Keypt Dagkeyp

Hallur Poulsen hevur nú eisini keypt matvøruhandilin, Dagkeyp, í Syðrugøtu. Dagkeyp er gamli handilin, Valhøll, sum seldi alt millum himmal og jørð.

Í dag er hetta ein matvøruhandil, og Hallur fer at reka handilin víðari sum slíkan. Møguliga fer hann eisini at hava onkrar gávulutir á hillunum.

- Ætlanin er ikki at lata handilin í Syðrugøtu aftur og síðan lata hann uppaftur. Eg fari at royna at fremja tær broytingar, sum skulu gerast, so hvørt, meðan handilin er opin.

Tó kann hugsast, sigur Hallur, at stongt verður einar 2-3 dagar, og hetta verður líka so nógv fyri at vísa á, at Dagkeyp nú letur uppaftur í nýggjum hami.

- Tað eru nógv gomul fólk í bygdini, sum ikki keypa aðrastaðni enn í Syðrugøtu, og hetta er eisini ein orsøkin til, at eg havi valt ikki at lata handilin aftur, meðan onkrar broytingar verða gjørdar. Tí koma fólk at síggja hesar broytingar "hen ad vejen", sum hann tekur til.

Handilsmaðurin sigur, at ætlanin er ikki at gera tær heilt stóru broytingarnar, men handilin í Syðrugøtu verður í fyrsta lagi longri opin, og Hallur fer at syrgja fyri, at allar vanligar matvørur eru á hillunum og í diskunum.

- Í Syðrugøtu verður opið á leið somu tíðir sum í Norðragøtu, men sunnudag verður stongt.

### 16 á lønarlista

Nú Hallur eisini hevur keypt matvøruhandilin í Syðrugøtu, kemur hann at hava tilsamans 16 fólk á lønarlista. 13 eru knýtt at virkseminum í Norðragøtu, og 3 verða knýtt at handlinum í Syðrugøtu.

- Millum hesi 16 eru fleiri ungfólk, sum eru íðin at taka hond í eftir skúlatíð, sigur ungi gøtumaðurin, sum nú eigur tveir rímiliga stórar handlar í Gøtu kommunu.